## Hollendskir áskoðarar amok í Fraklandi

Fleiri dystir vóru á skránni í bólkaspælinum í UEFA-kappingini í gjár, og ein av hesum var dysturin í millum franska felagið, Nancy, og hellendska Feyenoord. Allan dagin høvdu hollendskir áskoðarar gjørt um seg í annars friðarlaga býnum í Lorraine, og dysturin var ikki meir enn byrjaður, so var aftur gali. Setur og onnur ting flugu gjøgnum luftina inni á stadion, og tá 11 minuttir vóru eftir at leika, valdi norski dómarin, Espen Berntsen, at bríksla dystin av, tí tá lá eitt tjúkt lag av táragassi á vøllinum. Støðan var annars 3-0 til Nancy, tá dysturin bleiv avblástur.



## Cannavaro leggur líka í kritikkin

Liðskiparin á italska fótbóltslandsliðnum, Fabio Cannavaro, bleiv fyri stuttari tíð síðani kosin til besta leikara í Evropa. Eftir hetta hava m.a. fronsku venjararnir Raymond Domenech og Gerard Houllier verið frammi við kritikki av valinum av júst Cannavaro sum ársins leikara. Nú sigur Cannavaro tó, at hann leggur líka í kritikkin. – Eg tími ikki at viðmerkja slíkan kritikk. Eg virði teirra meiningar, men svarið er tað sama. Tann gylti bólturin liggur heima hjá mær, sigur Cannavaro, sum nú eisini er blivin innstillaður til heiðurin sum heimsins besti fótbóltsleikari, har hann kappast við Zinedine Zidane og Ronaldinho.

TB-ÍF

# Brak í Trongisvági

**Toppdystur verður í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti, tá TB tekur ímóti ÍF. Vinnarin kann leggja mótstøðuliðið aftur um seg í stríðnum um oddasessin.**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kappingin í meistaradeildini hjá kvinnum hevur verið sera jøvn í ár. Øll liðini hava spælt upp ímóti hvørjum øðrum, og í flestu dystunum hava bæði liðini vunnið okkurt settið. Í oddinum liggja TB, Dráttur og ÍF jøvn við 12 stigum og beint í hølunum á teimum liggur SÍ við 10 stigum.

Sunnudagin verður so sannur toppdystur á skránni í Trongisvági, tá ÍF vitjar hjá TB. Gongdin hjá hesum báðum liðunum hevur verið góð í ár. Síðsta vikuskiftið vann TB toppdyst á heimavølli ímóti Drátti, so kvinnurnar av Tvøroyri hava fingið best hugsandi upptaktina til dystin ímóti ÍF.

ÍF hevur hinvegin ikki fingið bestu upptaktina til henda dystin. Mánakvøldið blivu tær hølvaðar av á Kambsdali, tá tær møttu SÍ, og í undanfarna dystinum vunnu tær við bit og slit á KÍF í Kollafirði.

Hesi bæði liðini hava møtt hvørjum øðrum eina ferð fyrr í ár, tá tey møttust á Kambsdali fyri góðum mánað síðani. Her var ÍF betra liðið, og tær vunnu dystin 3-1. Nú fær TB so nýggjan møguleika at vinna á ÍF. Megna tær hetta, so vera tær framhaldandi oddalið í bestu deildini, samstundis sum tær kunnu leggja ÍF aftur um seg. ÍF ætlar sær eisini sigurin í Trongisvági, tí tær eru í júst somu støðu sum TB.

TB má tó metast at vera favorittur til dystin, tí at tær hava víst betri spæl enn ÍF síðstu dystirnar, og haraftur at hava tær vunnið allar dystirnar í Trongisvági í ár.



StÍF-H71

# StÍF skal í gongd aftur

**StÍF tekur sunnudagin ímóti H71 í Atlantic Airways deildini hjá monnum. Her skulu bæði royna at reisa seg eftir ósigur síðsta umfar, men StÍF er stórfavorittur at vinna dystin.**

MANSHONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hesi bæði liðini hava fingið sera ymiska byrjan uppá kappingina í bestu mansdeildini í hondbólti. StÍF hevur alt árið ligið heilt uppi í oddinum, og í løtuni eru teir á triðja plássi bert tvey stig aftanfyri oddaliðið, VÍF. Gongdin hjá teimum hevur verið góð í ár. Teir hava bert tapt ein dyst, og hann taptu teir mikukvøldið, tá teir vitjaðu hjá VÍF í Vestmanna.

Hjá hoyvíkingum hevur hinvegin ikki gingið so væl. Teir fingu eina fína byrjan uppá kappingarárið, men síðstu dystirnar hevur gingið minni væl. Mikudagin blivu teir so hølvaðir av í botndystinum ímóti Kyndli, so nú er H71 niðast í Atlantic Airways deildini hjá monnum við trimum stigum.

Júst hesi bæði liðini hava leikt einaferð fyrr ímóti hvørjum øðrum í ár, tá liðini møttust í Hoyvíkshøllini. Tann dysturin endaði við javnleiki, so kanska fólk kunnu vænta ein spennandi dyst á Skála eisini. Hjá StÍF hava flestu dystirnir verið rættiliga javnir í ár, so tað er ikki óhugsandi, at hoyvíkingar enn einaferð fara at leypa hvøkk á strandingar.

**Hondbóltsstøður**

**Sunset-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 123 | 97 | 26 | 8 |
| 2 Neistin | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 123 | 103 | 20 | 7 |
| 3 VB | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 112 | 117 | -5 | 6 |
| 4 StÍF | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 130 | 156 | -26 | 3 |
| 5 Kyndil | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 108 | 123 | -15 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 200 | 184 | 16 | 11 |
| 2 Neistin | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 227 | 199 | 28 | 10 |
| 3 StÍF | 7 | 3 | - | 3 | - | 1 | 192 | 192 | 0 | 9 |
| 4 KÍF | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 185 | 193 | -8 | 5 |
| 5 Kyndil | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 196 | 205 | -9 | 4 |
| 6 H71 | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 183 | 210 | -27 | 3 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 9 | 6 | - | 3 | 22 | 10 | 12 | 12 |
| 2 ÍF | 8 | 6 | - | 2 | 22 | 15 | 7 | 12 |
| 3 Dráttur | 9 | 6 | - | 3 | 21 | 16 | 5 | 12 |
| 4 SÍ | 8 | 4 | - | 4 | 16 | 17 | -1 | 8 |
| 5 KÍF | 9 | 2 | - | 7 | 14 | 21 | -7 | 4 |
| 6 Mjølnir | 9 | 2 | - | 7 | 8 | 24 | -16 | 4 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 7 | 5 | - | 2 | 18 | 10 | 8 | 10 |
| 2 ÍF | 6 | 5 | - | 1 | 15 | 10 | 5 | 10 |
| 3 Fram | 7 | 4 | - | 3 | 14 | 14 | 0 | 8 |
| 4 Fleyr | 7 | 2 | - | 5 | 12 | 17 | -5 | 4 |
| 5 SÍ | 7 | 1 | - | 6 | 12 | 20 | -8 | 2 |